# R BYRJAR VIÐ L



FRÍKORTER

*Tey eru øll savnaði uttanfyri Kelduna til eitt vælfortjent fríkorter. Nakað av útgerð er komin til børnini, men meiri er í væntu*

## Eg havi lært nógv. Vit hava lært um bókstavin Á, og eitt sindur um bókstavin L

MARTIN ÓLI ARGE, NÆMINGUR

men fyri teir átta næmingarnar er týðiligt at merkja, at tey halda hetta vera eina góða byrjan uppá dagin.

### Brotin sigarett

Sangurin er ikki meiri enn liðugur, fyrrenn ein hond fer upp í loft.

- Kunnu vit ikki syngja sangin "Dukka mín er blá"?, kemur tað frá einum næmingi.

- Jú, sigur Birna. - Tað er so gaman í. Men tónleikurin í samvirknu talvuni til tann sangin riggar ikki í dag. Tað riggaði í gjár, men eg havi skilt, at tað verður í lagi seinni í dag. So er tað ikki í lagi, at vit taka hann í morgin ístaðin?

Tey stemma í ein annan barnasang, og nú tey eru komin so gott í gongd við sanginum, fer Birna yvir til ta prentaðu talvuna við føroyska stavraðnum. Og so ljóðar sangurin um føroysku bókstavirnar út í Bláu stovu.

- Syngið tit nú einaferð, uttan at eg syngi við, sigur Birna, sum løtu seinni kann klappa fyri teimum átta næmingunum sum megnaðu hetta uttan hjálp.

- Ja, tað má eg siga. Tit eru ótrúliga røsk at syngja. Nå, men nú fara vit yvir til dagsins bókstav. Nú verður spennandi at vita, um tit kenna hann.

Hon trýstir á samvirknu talvuna, og eitt sekund seinni dagar dagsins bókstavur fram á talvuni - L, formað sum ein brotin sigarett.

### J ella L

Børnini bresta út úr at flenna, eftir stuttligu tekningini.

- Hatta líkist einum J, sigur ein av næmingunum.

Hesin verður skjótt rættaður av læraranum, sum vísir á at hetta líkist J, men tað líkasum bogar hinvegin. Nei, hetta er ein bókstavur sum ikki færri enn fimm av næmingunum hava í teirra navni.

- Hatta er L, kemur tá frá einum øðrum næmingi.

Tekningin vísir eina brotna sigarett, formað sum bókstavurin L, men sum er brotin av um beinini, og tí hevur eina tubu av límí, stavað við stóra l, í hondini.

Tey tosa eina løtu um tekningina. Øll eru væl við í prátinum, og tey verða enn ídnari, tá nú Birna spyr, um nakar teirra hevur L í sínum navni.

Tey fyrstu fimm eru skjót at

Framhald

## Ein fíggjarlig avbjóðing

Hugskotið um fyrsta kristna frískúlan er ikki tikið úr leysum lofti: Skúlin er snøgt sagt ein partur av visjónini hjá samkomuni Kelduni, og er tí í mangar mátar at meta sum eitt barn teirra.

Hetta hevur aftur havt við sær, at samkoman stendur 100 prosent aftanfyri frískúlan, og veitir stuðul til raksturin.

Frískúlin hevur søkt um stuðul frá teimum kommununum, haðani næmingarnir eru: Tórshavnar, Runavíkar og Sjóvar kommunur og úr Eysturkommunu, og hevur higartil fingið játtandi svar úr Runavíkar kommunu.

Játtan er somuleiðis komin úr Mentamálaráðnum til 12 næmingar í 1. flokk og 27 lærаratímar. Tað er tó ongin loyna, at enn vantar nakað í, til raksturin av frískúlanum ber seg. Nú fyrstu lønirnar skulu gjaldast, fer leiðslan í frískúlanum at hava fund um málið hesa vikuna.

Tað er serliga fíggingin av frítíðarstovuni, sum er ein avbjóðing fyri frískúlan, men uttan hetta tilboðið, høvdu nógv foreldur aftrað seg við at sent børnini í forskúla og 1. flokk. Tí avgjørdi leiðslan fyri samkomuna og skúlan at geva hetta samlaða tilboðið.

Leiðslan hevur tó staðfest, at nógv sjálvboðin fegin vilja taka eina hond í arbeiðið rundan um skúlan, og er ætlanin haraftrat at seta á stovn ein foreldrabanka, har foreldur kunnu hjálpa til við ymiskum praktiskum, so sum baking, matgerð, kappingum, venjing av drama/dansi og øðrum.

Vónin er, at skúlin skal fíggjarliga bera seg, sum tíðin líður og hetta vilja vit arbeiða fram ímóti. Men stórur dentur verður lagdur á, at ætlanin hvørki er ella hevur verið at spara uppá tað, sum kann geva næmingunum tað sum krevst fyri at geva teimum eina holla og dygdargóða undirvísing.